# FISKI – og TILFEINGISMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið – Landsstýrismálanevndin
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

**Fiskivinnustovan**
Tórshavn, tann 16. mai. 2008
Mál.: 200800193 / 5
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: ANKR

Tygara skriv: 7.13-20080003

Landsstýrismálanevndin heitti í skrivi dagfest 27. mars 2008 á Fiski- og tilfeingismálaráðið um at fáa innlit í málið um innflutningsloyvi og flyting av fiskiloyvum til nýggja Næraberg, her undir eisini søguna hjá nevnda ella nevndu fiskiloyvum.

Fiski- og tilfeingismálaráðið avgreiddi áheitanina 11. apríl 2008 um innlit og flýggjaði Landsstýrismálanevndini skjalamappurnar, sum eru viðkomandi.

Landsstýrismaálanevndin hevur á fundi 24. apríl 2008 tikið avgerð um at senda Fiski- og tilfeingismálaráðnum skjalamappurnar aftur og biðja ráðið ístaðin "gera nevndini eina frágreiðing við einum samandrátti, herundir við eini lýsing av gongdini og viðkomandi upplýsingum í sambandi við, at upprunaloyvið varð givið og hvørja ferð loyvi hevur skift eigara", umframt at senda nevndini viðkomandi skjøl.

Fiskimálaráðið sendir hervið ein samandrátt og eina frágreiðing um málsgongdina, frá tí málið viðv. m/s Næraberg OW 2176 byrjaði í 1999, og til Fiskimálaráðið 1. februar 2008 játtaði tí seinna m/s Næraberg OW XPUT innflutningsloyvi, og at veiðiloyvið hjá m/s Atlantic Navigator OW 2132 kundi flytast á nýggja skipið.

Viðløgd eru avrit av viðkomandi skjølum í málinum.

Ynskir Landsstýrismálanevndin nærri kunning um málið, er hon vælkomin aftur at venda sær til Fiski- og tilfeingismálaráðið.

Vinarliga heilsan

Andras Kristiansen

16. MAJ 2008

Løgtingið j. nr.
7.13-20080003 6

Ministry of Fisheries and Natural Resources
Heykavegur 6A • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo